


# Fýra % av arbeiðsstyrkini starvast innan oljuvinnunao

Jan Müller

16.09.2013 - 11:03

Oljan.fo

Nýggj greining, sum Virkisráðgeving hevur gjørt fyri Oljuvinnufelagið, vísir, at heili 942 føroyskir løntakarar starvast innan oljuvinnuna. Hetta er væl at merkja, teir føroyingar, sum hava sín bústað í Føroyum. Afturat hesum koma teir føroyingar, sum eru búsitandi aðrastaðni.

Í 2012 var talið 858 føroyingar, sum svaraði til 3,61 % av arbeiðsstyrkini. Verður nýggjasta uppgerðin yvir arbeiðsstyrkina nýtt, so svara tølini í 2013 til knøpp 4 %. Eisini er týðiligt, at hetta er ein vinna, sum serliga hevur mannfólk í starvi. Í 2013 starvaðust 25 konufólk og 917 mannfólk innan vinnuna.

Av teimum 942 løntakarunum starvast 674 hjá føroyskum arbeiðsgevarum og 268 hjá útlendskum arbeiðsgevara. Í 2012 vóru hesi tøl ávikavist 608 og 250.

Innan offshore starvast 361 fólk (í 2012 var talið 349), onshore í Føroyum starvast 70 (í 2012 var talið 65) og onshore uttanlands starvast 243 (í 2012 var talið 194) skrivar heimasíðan hjá Vinnuhúsinum